– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Dámlig og hugnalig hús í miðbýnum

**Tú ert at kalla mitt í býnum, men komin inn í garðin er tú mest sum úti í náttúruni**






**Fyrsta fatanin – uttanfyri og uttanum**
Inngongdin til ognina er ein lítil gøta fram við einari á inn frá Landavegnum yvir av Vesturkirkjuni. Tú kemur so at siga inn í eina friðarliga og hugnaliga oasu mitt í býnum. Uttanumøkið er stórt – ja, heilar 851 m² við við trøðum, runnum og grasvølli. Her eru hópin av møguleikum fyri trivnaði, hugna og ítrivi, og tú kemur ikki nær nakrari ferðslu av týdningi.

**Stílur og snið – úti og inni**
Húsini eru sum nýggj uttan við tað, at alt uttan er skift. Har er nýtt tak, klædningur, vindeygu og hurðar, og húsini eru bjálvað heilt inn at innveggjunum. Vindeyguni eru stór og góð og geva húsunum ein tignarlignarligan dám umframt eitt frálíkt ljós inn í húsi, sum varliga eru dagførd innan við lættari hond, so upprunadámurin og stílurin er eftir. Annars er nýtt oljufýr, nýggj vatninnføring og nýggj kloakk út til rottangan. Úr ovastu hædd er útsýnið frálíkt yvir Havnina, Nólsoy og út á fjørðin.

**Innrætting**
Húsini hava sum er 2 sjálvstøðugar íbúðir við egnari inngongd, men tær kunnu leggjast saman aftur til eina búðeind. Í miðhæddini er inngongd, gongd, baðirúm stova / køkur, kamar, inngongd og trappugongd. Í ovastu hædd er trappupallur, baðirúm, køkur / stova og 2 kømur. Í niðastu hædd er lágur kjallari við fýrrúmi / vaskirúmi og goymslurúmi.

**Fakta**
**Adressa:** Landavegur 61, Tórshavn
**Byggiár:** 1936/1995-2007
**Hæddir:** 3
**Gólvvídd:** 150 m²
**Grundøki:** 851 m²
**Prísuppskot:** kr. 2.000.000,00






PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**